LÍVSVERK
EFTIRLØNARGRUNNUR LØNTAKARANNA

Stoffalág 17
FO-100 Tórshavn
tel: +298 206070
www.livsverk.fo
livsverk@livsverk.fo

Fíggjarmálaráðið
Ministry of Finance
Tinganes
100 Tórshavn

Fylgiskjal 8

fmr@fmr.fo

Tórshavn, hin 3. Oktober 2025

Viðmerking til eftirlønarlógina

Tað er gott, at orðaljóðið í §1 verður broytt til "kann" soleiðis at ásetingin gerst greiðari. Ymiskt hevur verið, hvussu myndugleikar hava tulkað hesa áseting. Nú er greitt, hvussu ásetingin um inngjald verður áðrenn og eftir at persónur hevur nátt eftirlønaraldur.

Tað er gott at frítøkan í lógini um útlendingar í tíðaravmarkaðum starvi verður avtikið, tí hetta hevur skapað óneyðugar avbjóðingar. Summir útlendingar rinda inn í skipanina í eina tíð, og so tá ið tey frætta, at neyðugt ikki er at rinda, so verður søkt um at fáa eftirlønina útgoldna, sum síðani verður váttað av Taks. Tá ið útlendingurin so hevur verið í Føroyum í 5 ár, so byrja tey aftur at rinda inn til eftirlønarskipanina.

Tað er eisini gott, at ein áseting verður um útgjald, tá ið útlendingarnir flyta av landinum aftur. Viðmerkjast skal, at tað hevði verið gott at fingið áseting um, at fólk ikki í fleiri umførum kunnu fáa eftirløn útgoldna. Skal persónur hava eftirløn útgoldna á øðrum sinni, tí viðkomandi flytir av landinum, so átti ein áseting at verið um, at viðkomandi skal ikki hava búð í Føroyum í 10 ár. Hesa orðingina hevur grunnurin í reglugerðini fyri óskattaðu eftirlønina "*limur sum eina ferð hevur fingið eftirlønina útgoldna og kemur aftur til Føroyar at arbeiða, kann tó ikki fáa eftirlønina útgoldna fyrr enn 10 ár aftaná at limurin er fluttur av landinum aftur."* Og átti henda ásetingin komi við í eftirlønarlógina.

Vinaliga

Eftirlønargrunnur Løntakaranna – LÍVSVERK